# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*





Suzuki Grand Vitara persónbilur frá 2005. Km. 29.000, aut. Bensin, krók o.a. til sølu fyri 159.000 v/mvg.

**Tlf. 210564**





# Fimm ættarlið



Mynd av 5 ættarliðum: dóttir, mamma, omma, langomma og olduromma.

Á myndini eru: lítla diddan, mamman Anna Melchior Hansen, omman Helena Hansen, langomman Annebet Johansen og olduromman Lena á Ørg, øll úr Sørvági.

# Realskúlagentur í svimjihylinum

**Dagurin**

**20. august. Bernhard,** deyður í 1153. Abbati og kirkjulærari í Fraklandi. Kom upp í munka- og nunnuskipanina, ið róptu seg cisterciensaraskipanin. Har gjørdist hann skjótt oddamaður, og fekk stóran týdning í kirkjupolitikki og kirkjulæru í 12 øld. Bygdi í 1115 kleystrið Clairvaux og varð síðani róptur Bernhard úr Clairvaux. Hann var vanur at taka til: Ora et labora (bið og arbeið). Navnið er germanskt og merkir bjørn og harður.

Her er ein av myndunum frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin her er av gentum í einum realskúlaflokki, sum sita á eini vippu í Svimjihylinum í Gundadali skúlaárið 1960-61.

Tær eru f.v.: Torgerð Skaale (Hentze), Lilian B. Nielsen, Bjørg Rein, Ása Joensen, Annelot Hentze (Rasmussen) og Súsanna Thomsen (Dam)

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Tórgerð Hentze*

